# Jólatónar í Hoyvík

Samkoman Immanuel fer at skipa fyri einum jólatiltaki, ið kallast Jólatónar, fríggjadagin 22 desember, kl. 16.

Tiltakið verður uttan fyri samkomuna, ið er beint omanfyri FK í Hoyvík.

Ókeypis heitt kakao og bollar verður at fáa, samstundis verður live jólatónleikur spældur á einum palli. Tey, ið fara at framføra eru millum annað Heine Lützen, Oddbjørg Poulsen, Tehilah-kórið, og onnur.

Inni í samkomuni verður ein jólascena sett upp, og eru vitjandi vælkomin innar at seta seg eina løtu at hugsa um Jesubarnið í fjósinum.

Í jólaevangeliinum lesa vit um einginlin, ið kom til hirðarnar á markini, og segði: ”Friður á jørð… ” Mangan eru fólk so upptikin við at stákast til jóla, at orsøkin til jólini verður gloymd; grundin til vit halda jól, er fyri at minnast Jesubarnið í krubbuni, Frelsarin er føddur!

Við hesum tiltakinum v Samkoman Immanuel gev fólki eitt upplagt høvi "kobla úr" eina løtu í øllu jólaresinum, og seta foku á grundina til vit halda Jó

Á enskum verður soleið tikið til: Jesus is the Reaso for the Season!

Jólatónar verður fríggja dagin 22. desember k 16 – og øll eru hjartalig vælkomin.



Til ein stovn undir Almannastovuni ynskjast hús ella høli í miðstaðarøkinum til leigu so skjótt sum til ber.

Hús ella høli ynskjast til leigu

Stovnurin skal hýsa 8 starvsfólkum og 5 børnum í aldrinum umleið 7-13 ár. Ein hóskandi stødd kundi verið umleið 160 - 250 fermetrar í einari ella fleiri hæddum.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Maud Poulsen á telefon 35 35 10 ella á teldupost maudp@almannastovan.fo

RÓKIN BÚSTOVNUR

Almannastovan · Smyrilsvegur 20 · Postsmoga 3096
110 Tórshavn · www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80

# Nýggjur prestur í Klaksvík

**14. januar 2007, verður cand. teol. Magnus Brahé Jørgensen úr Havn prestvígdur og innsettur sum sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi**

PRESTAVÍGSLA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Vígslan og innsetingin fara fram í Christianskirkjuni við guðstænastu, sum byrjar kl. 11.00. Tað er Hans J. Joensen, bispur, sum stendur fyri vígsluni, meðan Bjarni Bæk, dómpróstur, stendur fyri innsetingini.

Magnus B. Jørgensen avloysir Hans Eiler Hammer, sóknarprest, sum nú røkir prestaembæti í Noregi. Við starvinum er tænastubúðstaður, nevniliga prestagarðurin á Prestvegi í Klaksvík. Prestagarðurin, sum júst er umvældur, er bygdur í 1928.

Sjey umsóknir vóru til starvið í Norðoya vestara prestagjaldið, sum umfatar kirkjusóknirnar Klaksvík, Árnafjørð, Kunoy, Húsar og Mikladal.

Tveir prestar eru í prestagjaldinum. Hin sóknarpresturin er Niels Pauli Danielsen.

Norðoyggjar vóru til 1934 eitt prestagjald við einum presti, sum búði í Ónagerði á Viðareiði. Í 1928 varð búfastur kappelánur settur í starv í Klaksvík. Í 1934 varð Norðoya vestara prestagjald varð skipað. Í byrjanini var bert ein prestur, men síðani 1948 hava teir verið tveir. Báðir prestarnir búgva í Klaksvík.

*kelda: Fólkakirkjan.fo*

# Nýtt fraktfelag til allan heimin

Farmadeildin hjá Flogfelagnum er nú seld nýstovnaða felagnum EUR-Express.

Nýggja felagið, sum heldur til á sama stað sum Flogfelag Føroya, fer at bjóða fram fleiri flutningstænastur bæði loftvegis og sjóvegis.

EUR-Express hevur gjørt avtalu við altjóða flutnings- og speditørfyritøkuna TNT Freight Managament um samstarv. Henda fyritøkan hevur skrivstovur kring allan heimin.

Stovnarar av EUR-Express eru Eron Debes, Uni Danielsen og Rúni Magnusson, hvørs forbókstavir geva styttingina í navninum EUR.

Felags fyri stovnararnar er at teir allir hava tilknýti til Flogfelagið: Rúni í bókhaldinum, Eron í avgreiðsluni hjá felagnum á flogvøllinum og hevur annars royndir við farmaflutningi, og Uni sum verður nevndarformaður.

Skipanin er hon, at Rúni og Eron hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum, saman við tveimum nýggjum starvsfólkum, Hera Guttesen og Jónu Dam.

Felagið bjóðar seg fram til alla avgreiðslu í samband við farmaflutning til og úr Føroyum.

Starvslýsing www.runavik.fo



## Leiðara til Dagrøktina á Skála

Runavíkar kommuna søkir eftir dagrøktarleiðara at byrja 1. februar 2007 ella skjótast gjørligt.

Dagrøktarskipanin á Skála er í løtuni normerað til 69 børn, tey verða ansa av 16 dagrøktarum, harav tveir starvast í Oyndarfirði. Í skipanini eru góð spælistovuhølir har økis/spælistovupedagogur leggur lag á og veitir ráðgeving.

Runavíkar kommuna hevur ítøkiligar ætlanir um at byggja barnagarð á Skála, sum skal standa klárur í 2008. Barnaansingin á Skála verður tí fyri broytingum komandi árini og dagrøktartarleiðarin kemur at hava ein avgerandi leiklut í hesum arbeiði.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av dagrøktini. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, heldur fram við at menna dagrøktina. Umráðandi er, at umsøkjarin evnar at ganga nýggjar leiðir, dugir væl at samstarva og er sjónligur í sínum leiðarastarvi.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, lønt eftir lønarstigi 17 til 21.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi ella líknandi kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita um starvið, við at tosa við Jákup Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Runavíkar kommunu í hendi týsdagin 9. januar 2007, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Postboks 139
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**
*...ein kommuna í menning*